# Sangskúlin byrjaður

**Hugskotið um ein sangskúla í Føroyum er ikki nýtt, men leingi hevur verið arbeitt við ætlanini, og nú er sangskúlin byrjaður. Hetta er úrslit at samvinnu við íslendskt tónleikalív, har tey sum nøkur av teimum fáu í heiminum hava ein veruligan sangskúla, sum eisini hevur givið sera góð úrslit**

SANGUR

*Dagfinn Olsen*

Hugskotið um at seta á stovn sangskúla í Føroyum er ikki nýtt og Ólavur Hátún er ein teirra, ið hevur arbeitt við at fáa hetta til veruleika.

Hann greiðir frá, at vit í mong ár hava havt samvinnu við íslendskt tónleikalív. Longi varð arbeitt við at fáa í lag musikskúla og tá hesin kom, vóru lærararnir íslendskir.

- Tá fyrsta kórstevnan var í Vági í 1982, ella har á leið, vitjaði Jón Stefansson og konan Óløf Kolbrún Harðardóttir, ið er songkvinna. Til Atlantsljóm fyri stuttum vitjaði polskur tónleikalærari og dirigentur, ið lovaði at útvega fremstu solistar og dirigentar. Og hann peikaði júst á Óløf, sigur Ólavur og nevnir, at hesi fólk hava verið við at byggja upp sangskúlan í Íslandi.

Ísland er eitt av teimum fáu londunum, ið hava veruligan sangskúla. Hesin hevur givið sera góð úrslit og hevur havt alstóran týdning. Umframt, at sanglærarar spyrjast burturúr, finnast í dag eini 40 íslendskir kendir sangarar á kendu sang- og operahúsunum kring knøttin.

## Drúgv ætlan

Ólavur hevur sjálvur ikki so nógv við sjálvan sangskúlan at gera, men nevnir seg meira sum hugsunnarmann aftanfyri og ein, ið hevur verið við til at seta í gongd. Mong skeið hava verið millum ár og dag og fundast hevur verið óført. Men nú er gongd komin á og ein sangskúli í Føroyum er nú veruleiki.

Hesin virkar eftir somu reglum, sum tann í Íslandi. Pianistur er við til venjingarnar og dentur verður lagdur á, at sangarar eru ikki bert sangarar, men eisini tónleikarar, ið duga og hava innlit.



*Óløf Kolbrún Harðardóttir er lærari í nýggja sangskúlanum*

Í juni var upptøkuroynd og ikki stóð á at fáa næmingar. Hesir eru bólkaðir í fleiri bólkar. Sungið verður saman og sum einstaklingar. T.d. eru ungir sangarar og eisini er ein bólkur, ið nevnist Master Class. Eisini verður vant sum kór og miðað verður eftir, at framførsla verður í juli av verkinum Carmina Burana.

Alt fer fram í samvinnu við sangskúlan í Íslandi.

## Góðar røddir í Føroyum

Stjóri og lærari er Garðar Cortis, sum eisini er stjóri á íslendska skúlanum, og so er eisini Óløf Kolbrún Harðardóttir lærari.

Føroyingar undirvísa í teori. Næmingarnir fara upp til roynd, eins og gjørt verður t.d. á Musikskúlanum.

Íslendsku lærararnir vænta sær nógv av sangskúlanum. Teir siga, at í Føroyum eiga vit góðar røddir og eisini hava føroyingar óvanliga gott oyra.

Lagt hevur verið fyri í Havnini. Fyrrapartar heldur skúlin til á Frúutrø og seinnapartar í Kommunuskúlanum. Flestu næmingarnir eru úr Havn, men næmingar teljast eisni úr 8 bygdum. Sum tíðin gongur, er eisni ætlanin at fáa bygdirnar við.

Tað er Petra Iversen í Kvívík, sum hevur føroysku umsjónina við skúlanum.

whazzzup!!!

Forrige Næste Svar Svar alle Videresend Flag Udskriv Rediger Slet Ombryd igen Udkast

**TELDUBRÆVIÐ**

Frá: Rúnar Reistrup, runar@imv.au.dk
Dagur 17.05.01
Til: turid@sosialurin.fo
Evni: Vikuskifti

# Gev mær navnið aftur

Eg uppfati ikki meg sjálvan sum heimføðisligan. Eg gangi ikki á gøtunum her í Aarhus og leingist eftir at síggja føroyskar strendur, og køldu vetrarkvøldini seti eg meg heldur at hyggja at danska fótbóltslandsliðnum enn at yrkja heimlangtandi reglur um fosturlandið. Mær dámar væl at búgva í Danmark, og man nokk ganga undir heitinum »ein væl integreraður innflytari« ella nýdanskari, sum í løtuni er tað mest politiskt korrekta orðið tú kanst nýta um ein perkara í Danmark, atlantshavsperkara í mínum føri.

Men eitt fornoktar seg ikki. Eg sakni føroysk viðurskifti, summi teirra í øllum førum. Mest av øllum sakni eg ikki at sakna eitt persónsnummar. Nummarið, sum eg eri komin at kenna sum mítt digitala navnaspjaldur, stendur á sjúkratryggingarprógvinum og við tíðini havi eg lært, at hetta sjúkratryggingarprógvið er mín ófrávíkiligi fylgissveinur, sum eg ikki komi langt uttan.

»Må jeg se deres sygesikringsbevis« er ein setningur, sum eg ikki kan torga. Seinast eg hoyrdi setningin var tá eg í gjárkvøldið skuldi læna fimtan kúlur til eitt pool-borð. Næstseinast eg hoyrdi hann var tá eg skuldi bíleggja mær rabattkort frá DSB fyrradagin. Men eg kundi eins væl víst prógv fyri míni sjúkratrygging fyri jólamanninum sum fyri smádreinginum í pool-barrini og skrankapávanum á banagarðinum. Eg trúgvi ikki, at nakar teirra leggur í at vita um eg eri tryggjaður ímóti sjúku ella ei. Men á sama korti standa við risastavum tølini 1906781723, nógv størri enn mítt navn og adressa, og hetta tykjast øll at hava ein øgiligan áhuga í. Hetta er mítt tal. Hetta er mít kennimerki. Hetta er mítt navn, nógv meira enn Rúnar Reistrup er tað. Sigi er Rúnar Reistrup, men skeivt persónsnummar trúgva tey mær ikki. Sigi eg rætt nummar, men skeivt navn, spyrja tey meg um eg eri vísur í at eg ikki eiti Rúnar Reistrup. Tað er tó sjáldan at eg verði spurdur um annað enn mítt nummar.

Heldur enn at útflýggja hvørjum einstøkum borgara í hesum landi eitt veruligt »persónsprógv«, verður sjúkratryggingarprógvið brúkt sum eitt slíkt. Tað ljóðar meira menniskjaligt at biðja um at síggja sjúkratryggingarprógv enn at síggja persónsprógv, og er uttan iva eisini lættari svølgiligt fyri fólk. Men veruleikin er tann sami. Tú ert eitt nummar, sum Terji hevði sagt tað.

Fyrsta uppliving eg hevði av hesum ópersónliga máta at viðgera fólk, var tá eg, enn búsitandi í Føroyum, søkti um pláss á universitetinum í Aarhus. Við navni, adressu og einum »er ikke i besiddelse af personsnummer« standandi í teiginum við heitinum »CPR-nummer« sendi eg umsóknina. Á ólavsøku varð brævt sent frá universitetinum til ta førosyku adressuna, sum eg sum trý ára gamal flutti til eftir at hava livað tey fyrstu trý ár av lívi mínum á Oyrasundskollegienum. Orsøkin, havi eg síðan funnið útav, var at eg fekk eitt persónsnummar tann dagin eg sá dagsins danska ljós, og at sambært hesum hevði eg eina adressu í Føroyum. Og hvørjum skal man so trúgva? Einum persóni, sum pástendur at hann býr á einari ávísari adressu, ella einum persónsnummari, sum gott nokk ikki er uppdaterað síðan 1981, men sum hevur eina aðra meining um adressuna hjá sama. Universitetið ivaðist ikki.

Eitt líknandi dømi um øgiliga trúvirðið hjá sjúkratryggingarprógvinum og øgiliga lítla trúvirðið hjá mínum glatta andliti, var tá eg skuldi brúka eina teldu á einum donskum bókasavni fáar dagar eftir at eg hevði mist tjóðarheitið »hjemmehørende på Førøerne«. »Må jeg se deres sygesikringsbevis?« spurdi støvuti bókavørurin og svaraði bara eitt turt »Nåh« tá eg greiddi frá, at eg ikki hevði fingið prógvið útflýggjað enn, men at eg hevði nummar 1906781723, eitt navn og vísti henni føroysku sjúkrakassaváttanina, koyrikortið og ES-passið. Tann dagin kom eg ikki so mikið sum nær eini teldu.

Nú góð tvey ár eru liðin síðan eg tók tey tungu stig oman á býráðsskrivstovuna á Vaglinum og bað um ikki longur at standa skrásettur sum havnarmaður, havi eg vant meg við at eita 1906781723 og verða personifiseraður av einum gulum sjúkratryggingarkorti. Men eg kann ikki fordraga tað og sakni ikki at sakna at eita annað enn Rúnar Reistrup.

*Rúnar Reistrup, Aarhus*



HOTEL VÁGAR ★★★ THE AIRPORT HOTEL

Ógloymandi
JÓLABORÐHALD

Aftur í ár stíla vit fyri borðhaldi, dansi, vistarhaldi og flutningi!
- tú skalt bara vera í veitslulag!

Legg saman útferð, jólaborðhald, gisting og dans
- og tú fært

eina stóra jólaveitslu!
fyri 595,-
v/ gisting og flutningi úr Havnini

The Saturday Night Christmas Fever
undirhalda og spæla til dans

Jólaveitsla og dansur 225,-

Dansur frá kl. 11.00 - 125,-

Ring og vit senda okkara spennandi jólamatskrá!
Jólaveitsla er í døgunum 24. nov., 1. des. og 8. des. frá kl. 19.00.
Annars fyriskipa vit veitslur eftir avtalu.

Jólaborð til hurðina úr 98,-
Smyrjibreyð úr 18,-
- vit koyra eisini út
í Tórshavn, Kollafirði og Vestmanna
Ring og hoyr nærri !

Bíleggið
í góðari tíð
á tel 33 29 55
- avmarkað atgongd!

Eisini verður
MÓTASÝNING
umframt nógv góð
tilboð frá mótabúðini
L'EY

HOTEL VÁGAR
FLOGFELAG FØROYA
SØRVÁGUR
TEL 33 29 55 · FAX 33 23 10 · T-Postur: hotel@ff.fo

**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi fráboðan:**

Skrásetingar-nr. Sp/f 1074, Sp/f Slættafelli, 480 Skáli.

Viðtøkur broyttar: 02.10.2001.
Nýggj adressa: 625 Glyvrar
Nýggjur heimstaður: Runavíkar Kommuna
Nevnd:
Farin úr nevndini: Vilhelm Magnus Olsen, 480 Skáli (formaður), Hans Jákup Johannesen, 480 Skáli og Jákup Frits Thomsen, 480 Skáli.
Innkomin í nevndina: Joen Jacob Jacobsen, 625 Glyvrar (formaður), Torbjørn Jacobsen, 625 Glyvrar og Bjørn á Heygum, R. C. Effersøesgøta 5, 100 Tórshavn.
Stjórn:
Farin frá sum stjóri: Jákup Frits Thomsen, 480 Skáli
Innkomin sum stjóri: Tórbjørn Jacobsen, 625 Glyvrar.
Tekningarreglur:
Felagið verður teknað av stjóra ella nevndarformanni ella allari nevndini í felag.
Endamál: Endamál felagsins er at reka reiðaravirki, íløguvirksemi, handil og annað starv í hesum sambandi.

Skráseting Føroya tann 4. oktober 2001

Kristin Balle

FØROYA HANDILSSKÚLI
TEKNISKI SKÚLIN
team85 • 316511

At læra og arbeiða munadygt

Undrast tú, hví tú ikki ert munadyggari í yrki og virki tínum? Vilt tú vera meira virkin og røkka fleiri úrslit í tínum dagliga lívi?
Vilt tú vita nakað um innlæring. førleika og intelligens og kenna tín innlærings- og intelligens-profil? Vilt tú vita nakað um heilan, minnið og minnisfremjan, "Brainstorming", "Mind Map", lesiteknikk og skjótlesing? Vilt tú læra at brúka tína mentalu orku betur, vera meira kreativ/-ur og kunna skipa arbeiðið betur?

Dagar: 30. okt. 1; 6, og 8. nov. kl. 16.00 - 20.00
Skeiðleiðari: Bergur Godtfred
Kostnaður: Kr. 2.600,00 íroknað frálæru, tilfar og mat.
Tilmelding: Innan 23. okt. 2001

SKEIÐSDEPILIN Á MARKNAGILI * SDM
Marknagilsvegur 77 • Postrúm 177 • 110 Tórshavn • Tel 31 88 13 • Fax 31 33 74,
T-postur: fh-sth@post.olivant.fo • Heimasíða http://sth.olivant.fo

FØROYA HANDILSSKÚLI
TEKNISKI SKÚLIN
Team 85 • 316511

Heilsa, Trygd og Umhvørvi - HTU
modul 4 og 5.

Innihald:
Í 4 og 5 moduli verður dentur lagdur á evni, ið knýta seg at heilsu og arbeiðsumhvørvi hjá teimum, ið arbeiða í oljuvinnuni, so sum vernd móti geislavirkni og krabbameinselvandi tilfari, lutfallið millum arbeiði og frítíð o.a. Í umhvørvismodulinum verður nomið við ivamálsorðingar so sum, hvat er eitt reint umhvørvi, hvat tolir umhvørvið, stýringsskipanir sum stýra óynsktum ávirkanum, viðgerð av burturkasti, basan av bráðfeingis dálkingum o.a.

Tíðarskeið: Modul 5: 17; 18; 19. og 20. okt. 2001. v/Geir Husdal
Modul 4: 21; 22; 23; og 24. nov 2001. v/ Meinhard Eliassen
(Modul 5 verður áðrenn modul 4)
Allar dagar: kl. 08.30 - uml.16.00

Kostnaður: Kr. 2.000,00 fyri hvønn, íroknað frálæru, tilfar og mat.

Stað: Føroya Handilsskúli, Tórshavn

Tilmelding: Í seinasta lagi 11. oktober 2001

Skeiðið er ætlað øllum, ið ætla sær at starvast innan frálandavinnuna og teimum í starvast innan vinnur, ið ætla sær at veita tænastur til frálandavinnuna. *Vert er at geva gætur, at eitt av 5 krøvum til virkir, sum ætla sær í oljuvinnuna, er at tey skulu hava eina skipan við atliti at heilsu, trygd og umhvørvi.*

SKEIÐSDEPILIN Á MARKNAGILI * SDM
Marknagilsvegur 77 • Postrúm 177 • 110 Tórshavn • Tel 31 88 13 • Fax 31 33 74,
T-postur: fh-sth@post.olivant.fo • Heimasíða http://sth.olivant.fo

Lærlingur

Seytjan í Klaksvík søkir lærling.

Hevur tú FHS ella HH, er dugnalig/ur og røkin, og áhugað/ur at seta snið og litir saman, send so eina skrivliga umsókn til Seytjan.

Seytjan
Box 127
110-Tórshavn
Freistin at søkja er 10. oktober

Sosialurin